UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment, Industry and Trade

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postbox 208
110 Tórshavn

Tórshavn 28.05.2020
J.nr.: 20/00315

Svar uppá spurning nr. 85/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Kristinu Háfoss, løgtingskvinnu, settur Helga Abrahamsen, landsstýrismanni í umhvørvis- og vinnumálum, um at peningastovnar seta krav til fólk um at nýta NemID

Spurningurin er soljóðandi

1. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt at seta krav um, at fólk í Føroyum skulu útvega sær danska NemID fyri at kunna nýta netbanka og lønarportal í Føroyum?

2. Fer landsstýrismaðurin at taka stig til at fáa semju við føroysku peningastovnarnar um at sleppa kravinum um, at fólk í Føroyum skulu nýta danska NemID?

a. Um ja, nær verður málið tikið upp við peningastovnarnar?

b. Um nei, hví góðtekur landsstýrismaðurin hesa støðu?

Svar til spurning 1
Sambært peningastovnunum er trygdin í gomlu innritanarskipanini (Cryptomatic) ikki nøktandi. Tað er sjálvandi óheppið, at brúkarar noyðast at skifta yvir til NemID, nú tað einans er umleið eitt hálvt ár til Talgildi Samleikin er klárur at taka í nýtslu hjá peningastovnunum.

Talgildi Samleikin skuldi eftir upprunaligu tíðarætlanini vera liðugur fyri umleið einum ári síðani. Um tað hevði eydnast, høvdu peningastovnarnir helst sloppið undan at biðið teir lutfalsliga fáu kundarnar, sum framvegis brúka Cryptomatic, um at skifta yvir til NemID. Gleðiligt er tó, at Talgildi Samleikin nú er liðugt mentur og fyrstu brúkararnir hava fingið hann útflýggjaðan. Farið verður næstu dagarnar undir eitt royndarskeið upp á 3-4 mánaðir fyri umleið 100 brúkarum, sum fara at brúka Samleikan á borgaraglugganum, vinnuglugganum, Mínrokning og Vanganum, sum er nýggi tænastuportalurin hjá Talgildu Føroyum. Næsta stigið í íverksetanini av Samleikanum verður í oktober, tá allir føroyingar fáa møguleika at fáa Samleikan útflýggjaðan. Tað er Fíggjarmálaráðið, sum varðar av Talgilda Samleikanum.

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment, Industry and Trade

Svar til spurning 2
Peningastovnarnir hava boðað frá, at teir vænta at taka Talgilda Samleikan í nýtslu við ársbyrjan 2021. Peningastovnarnir eru saman við SDC byrjaðir upp á tilgongdina at knýta samleikin í KT-skipanirnar hjá SDC. Tá peningastovnarnir byrja at bjóða sínum kundum at brúka Samleikan til sínar tænastur, byrjar tilgongdin at flyta kundarnar frá NemID. Sambært peningastovnunum kann hetta taka millum 10 og 12 mánaðir. Eftir ætlan skuldu allir brúkarar sostatt verið fluttir av NemID og á Samleikan áðrenn 2021 er úti. Tað er sambært peningastovnunum ikki nóg trygt at lata gomlu Cryptomatic-skipanina halda fram so leingi. Tí meti eg tað vera forsvarligt, at fyribilsskipanin við NemID kann halda fram, inntil skipanin við Talgilda Samleikanum verður endaliga sett í verk av føroysku peningastovnunum.

NemID verður í 2021 avtikin sum loysn, og yvirtikin av nýggju loysnini hjá dønum, nevnd MitID. Eftir ætlan verður MitID klárt at taka í nýtslu miðskeiðis í 2021, og fara teir so at brúka næstu mánaðirnar at fasa NemID út. Føroysku peningastovnarnir hava boðað okkum frá, at teir ikki luttaka í verkætlanini um MitID, og fara sostatt ikki at bjóða hesa loysn til føroyingar.

Sambært galdandi lóggávu, sum fyrrverandi landsstýriskvinna í fíggjarmálum á sinni bar í Løgtingið, hava føroysku peningastovnarnir skyldu til at brúka Talgilda Samleikan, tá brúkarar rita inn og nýta t.d. netbankan og lønarportalin. Tá verður einki krav um, at fólk skulu nýta t.d. NemID, MitID ella aðra útlendska loysn.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 28. mai 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður